F I S K I M Á L A R Á Ð I Ð

P/F Hvalnes
Norðhavnin 8
Postsmoga 329
710 Klaksvík

Fiskivinnustovan
08.10.2019
Fiskiloyvi nr. 58112

Kvotaskjal

Hjálagt sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvi:

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir svartkjafti í 2019

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
08.10.2019
Fiskiloyvi nr. 58112
Kvotaskjal

Royndarloyvi

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir svartkjafti í 2019

Eigari:	P/F Hvalnes
Skip:	NORÐBORG
Kallimerki:	XPYG
Havnakenningarmerki:	KG 689
Gildistíð:	Frá: 08.10.2019
	Til: 31.12.2019

Hetta royndarloyvið er latið samsvarandi ásetingum í § 58 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi, við møguligum seinni broytingum.
Loyvið heimilar royndarveiðu og áleggur skyldur og treytir, sum ásett í loyvinum.

Veiðirættindi:	Fiskaslag	Svartkjaftur
	Royndarveiða:	2.000 tons
	Fiskileið:	Ytra landleiðin
	Viðmerking:	Royndarloyvið eftir svartkjafti í 2019 er í hesi verkætlan avmarkað til í mesta lagi 2000 tons av rundum svartkjafti, sum fyri ein stóran part, skal virkast til HG-fisk umborð. Verkætlanin er samstarv millum North Atlantic Seafood Sp/f í Vági og Norðborg KG689. Talan er um feska vøru ella frysta vøru, sum eisini kann leggjast inn á frystigoymslu eina tíð (fram til ársskiftið). Talan kann eisini vera um rundan feskan ella frystan fisk til virkið í Vági, sum víðarivirkar fiskin. Rættindahavari er North Atlantic Seafood Spf – 2.000 tons NS

Reiðskapur: Uppisjóvartrol

Jákup Mørkøre

Treytir

Vinnuligar fiskiveiðiroyndir eftir svartkjafti í 2019.

Royndarloyvið verður latið samsvarandi ásetingunum í §12, stk. 2 og §58 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. des. 2017um fyrisiting av sjófeingi, sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 20. apríl 2018.
Royndarkvotan er útlutað sambært Kunngerð nr. 177 frá 21. des. 2018 um at skipa fiskiskapin eftir svartkjafti við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2019, sum broytt við kunngerð nr. 47 frá 26. apríl 2019 (broytt nøgd avsett til "Vinnuligar fiskiveiðiroyndir" undir §6, og §10).

Í samband við:
Verkætlanin er samstarv millum Høvdavirkið í Leirvík Jupiter FD42 og Finn Fríða FD86.
Tað er ein treyt, at øll tann tillutaða kvotan verður landað sum góð góðska (í mesta lagi 200-500 t/túr) og verður skorðin á virkinum og turkað til matna á Høvdavirkinum. Marknaðurin er serliga tann asiatiski og afrikanski.
Rættindahavari er Høvdavirkið í Leirvík – 1.000 (500+500) tons SK

ELLA
Í samband við:
Verkætlanin er samstarv millum Høvdavirkið í Leirvík, Gitte Henning 1 FD950 og Jupiter FD42.
Tað er ein treyt, at tillutaða kvotan verður nýtt í mest møguligan mun at "keypa part av lastini frá seinasta hálinum (í mesta lagi 200-500 t/túr)" hjá skipinum, men eisini verður møguleiki fyri at frysta ávísa nøgd inn á størri virki, og goyma vøruna á frystigoymslu til seinnu nýtslu. Rávøran verður møguliga upptiðnað á Høvdavirkinum, ella verður hon møguliga førd fesk í tangum til virkið í Leirvík og fer yvir egnu innvigingarskipanina hjá virkinum. Fiskurin verður skorin á Badderlinju ella aðrari linju (spuling), sum verður sett upp á virkinum. So gott sum øll veiðan verður nýtt til turkingar (matna).
Rættindahavari er Høvdavirkið í Leirvík – (500+798) tons SK (tilsamans 1.298 tøkum)

Loyvið verður givið við m.a. fylgjandi serligum treytum:
Frágreiðing skal gerast og sendast Fiskimálaráðnum, tá royndirnar eru gjørdar (seinast í 31. des. 2019).
Frágreiðingin skal lýsa:
o nær royndirnar eru gjørdar (nær - túranummar),
o hvørjar royndir eru gjørdar (dagur/nætur - túranummar),
o hvussu nógv er veitt, og nær eru prøvar/uppmátingar gjørdar
o hvørji skip vóru við í royndunum
o hvussu nógv var fiskað av royndarkvotuni hvønn dag og tilsamans.
o har royndirnar eru knýttar at framleiðsluvirki á landi skal greiðast frá, nær, hvar og hvussu (nøgdir) skipini hava landað, og hvussu hesi hava tryggjað so góða rávøru og góðsku sum gjørligt til framleiðsluvirkið í landi
o Somuleiðis eigur frágreiðingin at greiða frá, hvørji úrslit eru komin burturúr, og hvussu hesi kunnu ætlast at ávirka framtíðar virksemið, herundir hvør virðisøking er farin fram av rávøruni (menningar- og nýskapanarvirðið, sum er skapt við royndunum).
• Vørn/Fiskiveiðieftirlitið skal, hvørja ferð royndarfiskiskapur fer fram, fáa fráboðan um hetta.
• Kvoturnar kunnu bert nýtast av teimum skipum/bátum, sum eru nevnd í umsóknini og sum eru góðkend til fiskiskap undir Føroyum av Vørn/Fiskiveiðieftirlitið. Kvoturnar eru ikki umsetiligar og kunnu ikki flytast yvir á aðrar skipabólkar. Kvotur og kvotapartar, sum ikki eru nýttir í ár, fella aftur til Fiskimálaráðið pr. 31. des. 2019.

Annars eru treytirnar sum vanligt við royndarloyvi, tvs.:

1. Skiparin skal fylgja reglunum um fiskiskap á føroysku landleiðunum, sum eru ásettar í lóg um fyrisiting av sjófeingi og kunngerðum.
2. Skiparin skal
a) boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá, tá túrur/royndin byrjar (COE).
b) hvønn dag boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá knøttstøðu og veiðinøgd flokkað á fiskasløg undanfarna samdøgrið (CAT)
c) og tá túrur/royndin endar (COX)
d. Fiskiførini, ið partrola í hesi verkætlanini, kunnu ikki skifta makkara.
e. Tá fiskifør trola saman, verður veiðan, sum er fingin undir partrolingini ella samtrolingini, vanliga skrásett javnt býtt millum fiskiførini, ið hava partrolað ella samtrolað. Í hesum føri ber kortini til hjá skipinum einsamalt at fiska kvotuna, sjálvt um partrolað verður við onnur skip í verkætlanini. (GG: Skipini mugu vera nevnd í umsóknini).
3. Royndarfiskiskapurin skal bert fevna um beinleiðis veiðu eftir makreli og norðhavssild.
Hjáveiða av svartkjafti/makreli/norðhavssild má ikki fara uppum 10% samlað og í mesta lagi 2% av upsa, toski, hýsu og kongafiski.
Er hjáveiðan størri í hvørjum háli, skal skiparin alt fyri eitt boða Fiskiveiðieftirlitinum/Vørn frá og flyta til annað øki, har útlitini at fáa fiskaslagi, ið royndirnar fevna um eru betri.
4. Royndarfiskiskapurin skal fara fram í samstarvi við og undir leiðbeining av Havstovuni og nágreinilig dagbók skal førast yvir royndirnar eftir leiðbeining frá Havstovuni. Avrit av veiðidagbókini skal sendast Havstovuni, tá biðið verður um tað, og tá royndartíðin er av.
5. Undir royndarfiskiskapinum skal øll veiða skrásetast. Longdarprøvar skulu takast (um Havstovan biðir um hetta), og ein frystiprøvi skal takast regluliga eftir leiðbeining frá Havstovuni. Prøvar skulu merkjast við dato, knøttstøðu, dýpi, hálnummar og navn á skipinum og frystur skjótast gjørligt.
6. Havstovan og/ella Fiskiveiðieftirlitið/Vørn skulu kunna hava fólk við skipinum, sum felagið ber kostnaðin av.
7. Um treytirnar í royndarloyvinum ikki verða hildnar, kann Fiskimálaráðið taka loyvið aftur.